# »Súluskær« á Húsum

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Fólkatónleikarafelag*

Leygarkvøldið 6. januar, ið er trettanda kvøld, skipar Føroya Fólkatónleikarafelag fyri konsert við danska spælimansbólkinum "Suleskær" norðuri á Húsum á Kalsoynni.

Tey, ið spæla við í "Suleskær" á hesi vitjanini, eru Eskil Romme, ið spælir harmoniku og Peter Uhrbrand og Dorthe Haubro, ið bæði spæla fiól. Tey spæla fyri tað mesta danskan spælimanstónleik, ikki minst av oynni Fanø, har Peter og Dorthe búgva.

Konsertin leygarkvøldið byrjar kl. 20.

VIÐMERKINGAR

# Føroyingar aftur til føroysku tølini í 2001!?!

**Eyðun á Borg**
*Á Borg á Argjum um túsundáraskiftið 2000/2001*



(Tíggju, tjúgu, tríati, fjøruti (fýrati), fimmti, seksti, sjeyti, áttati, níti (níggjuti), hundrað)

Nú ein dagin spurdi norska Útvarpið nøkur ung fólk, um tey søgdu »trettito« ella »toogtretti«/»toogtredive«. Øll svaraðu »trettito«. Orsøkin til spurningin var, at nú vóru 50 (fimmti) ár liðin, síðan norðmenn aftur fóru at brúka tey upprunaligu norðurlendsku tølini. Hjá teimum eydnaðist ætlanin væl; onkur dugir kanska at greiða eitt sindur frá, hvussu mannagongdin var í Noregi!?

Spurningurin hjá okkum føroyingum í hesum spennandi broytingartíðum, har nógv verður tosað um tjóðarmál o.a., nú vit stevna inn í nýggja øld og samstundis nýtt túsund ára skeið, er tí eyðskildur: »Skulu vit fara aftur til tey upprunaligu, føroysku tølini, nú vit eru á veg inn í ár 1 (2001)«? Svarið er: »Ja, sjálvandi«!!!

Av norðurlendsku málunum er tað bert danskt, ið ikki nýtir ta gomlu norðurlendsku talskipanina, og nú eru vit, sum vera man, í sama báti sum danskt. Alheimsmálið enskt nýtir eisini norðurlendska háttin, har tíggjarin verður nevndur fyrst og síðani einari (t.d. 64: sixty-four). Tí hevði tað verið bæði greiðari og einfaldari, um vit fóru aftur til tey upprunaligu tølini!

**Útvarp Føroya 1957**
Í 1957 (fimmtisjey) byrjaði Útvarp Føroya at senda. Ta fyrstu tíðina vórðu sjálvsagt tey føroysku tølini brúkt. Onkur spurdi nú ein dagin, hví Útvarpið mundi gevast við at brúka tey. Svarið man vera, at av ófatiligum trongskygni fekk onkur Útvarpið at sleppa hesi skilagóðu ætlan, og farið varð aftur til tey margháttligu donsku tølini (sjey og hálvtrýss o.s.fr.). Hevði Útvarpið hildið fast við føroysku tølini tá, so høvdu tey allarhelst verið ein púra natúrligur partur av talumálinum í dag!!

**Hví mistu vit tølini?**
Ikki er tað so øgiliga langt síðani, at føroyingar brúktu tey føroysku tølini í talumálinum. Høvuðsorsøkin til, at vit mistu okkara tøl, mundi vera, at danski skúlin í Føroyum brúkti tey donsku tølini í síni donsku rokniundirvísing. Spell, spell!! (Løgið annars, at eingin tosaði um talbroytingar, tá vit fingu føroyskar roknibøkur!?! Men løtan var kanska ikki tann rætta tá.)

**Skert tjóðarmál?**
Tá føroyskt fær altjóða viðurkenning sum tjóðarmál, man tað ikki fara at søma seg at halda fram við teimum óføroysku tølunum sum t.d. 30 (tretivu), 70 (hálvfjerðs) ella 90 (hálvfems/hálvfemsinstjúgu· hálva fimtu ferð 20, t.v.s. 4 1/2 x 20). Talan hevði verið um eitt skert tjóðarmál. Tað er heldur ikki nóg mikið at hálvføroyska 30 (tretivu til trítivu), 70 (hálvfjerðs til hálvfjórðs) ella 90 (hálvfems til hálvfims).

**Ítróttarmál**
Í ítróttarmáli verður tað kanska ikki so einfalt hjá okkum, sum halda við B36 og B71, men tað er ikki neyðugt at broyta hasi nøvnini í talumálinum. Kanska kemur ein broyting av sær sjálvari, sum árini líða!?!

**Skúlabørnini**
Ikki er neyðugt at vera skúlafólk fyri at skilja, at talbroytingin fer at lætta um hjá skúlabørnum, serliga teimum veikaru!! Tað verður sjálvandi lættari og greiðari at siga og fata t.d. 75 (sjeytifimm, fyrst 7-talið, so 5-talið) heldur enn fimm og hálvfjerðs. Annars man vera greiðast at gera, sum dansk/føroyska orðabókin hjá Stiðjanum vísir á: tríatieitt (í einum) og tríatifyrsti (ein og tretivundi/tretivti).

**Áheitan á myndugleikarnar (Landsstýrið)!**
Hvussu seta vit so hesa broyting í verk? Jú, tað er helst rættiliga einfalt: Myndugleikarnir (landsstýrið) tekur málið til viðgerðar og tekur avgerð um, at loftmiðlarnir og fólkaskúlarnir (1. flokkarnir) fara at nýta tey føroysku tølini frá t.d. skúlaársbyrjan í tí Harrans ári 2001!! (Skúlabørn, sum eru byrjað við teimum donsku tølunum, kunnu sjálvandi halda fram við teimum).

**Veruleikafjart?**
Sjálvandi henda slíkar broytingar ikki frá degi til dags. Talan er jú um hugburðs- og talumálsbroytingar. Vit tilkomnu fara neyvan at brúka tey føroysku tølini; men hjá børnunum og teimum ungu kunnu hesi tøl gerast ein natúrligur partur av talumálinum. Betri høvi enn nú fáa vit neyvan. Við eini skiftistíð upp á eini 20-25 ár, og haraftrat einum góðum vilja, ber næstan alt til! Ætlanin er jú ikki at gera talskipanina truplari ella fløktari, men harafturímóti lættari og einfaldari! Onkur rødd er longu farin at brúka ta einføldu talskipanina, men neyðugt er eisini, at myndugleikarnir taka eina djarva avgerð!

Meðan hetta verður skrivað, boðar Útvarpið frá, at málgranskarar vænta, at 90 (níti)% av heimsins málum fara at doyggja í komandi øld!! Ikki man føroyskt fara at fáa slíka lagnu, men kanska kunnu hasir døpru spádómarnir vera ein ávaring til okkum føroyingar um, at vit mugu royna at byggja borð fyri báru! Eisini við talstrevi!

# Country konsert í Gøtu

Í kvøld kl 21.00 skipar Grót fyri stórari country konsert í losjuni í Gøtu. Tey luttakandi eru:
Ragnar í Vík,
Alex Bærendsen og
Erla Marita Askham,
sigur tónleikasamtakið GRÓT.



*Ragnar í Vík*

# Skipan av barnaforsorgarøkinum í framtíðini

**Eyðgunn Samuelsen,**
*býráðslimur*



Almanna- og heilsumálastýrið læt í november mánaði 2000, drúgva frágreiðing um hvussu barnaforsorgin virkar hjá okkum og í londunum kring okkum. Eisini inniheldur frágreiðingin uppskot til nýggja skipan av barnaverndarumsitingini.

Mælt verður til í álitinum,:" at barnaverndirnar verða um ikki avtiknar,so samansettar av fakfólki og leikfólki, og ikki sum nú bara av leikfólki, og at sama nevnd ikki skal taka avgerðir bæði í álvarsligum málum og minni álvarsligum málum. Mælt verður í hesum sambandi til, at ein høvuðsbarnavernd verður sett fyri alt Føroyar, og at økisbarnaverndir verða settar kring landið.

Tað eigur at vera staðfest, at barnaverndarøkið er ein landsuppgáva við eini høvuðsbarnavernd og umsiting tess í Tórshavn, og fleiri økisbarnaverndir við umsiting kring landið".

Hetta vóru orðini.

Hyggja vit í kommunuálitið, sum er leisturin ið landsmyndugleikarnir arbeiða eftir í hesum máli, verður í niðurstøðunum lagt upp til eina røð av broytingum, herundir at:

"Almannaøkið eigur at vera latið kommununum. Tað snýr seg bæði um forsorgina og barnaforsorgina".

Hetta samsvarar ikki serliga væl við, at tað í hesum máli verður lagt upp til eina lutvíst sentralt stýrda barnavernd við høvuðsskivstovu í høvuðsstaðnum, sum úti í økjunum skal hava skrivstovur sínar á Almannastovunum kring landið. Í øðrum lagi skulu lokalar "økis"-barnaverndir umsita partar av barnaverndarmálum.

Tað tykist, sum tað altíð er minsti felagsnevnari, ið verður tikin fram, tá ið grundgevast skal fyri at savna meira umsiting í Tórshavn, og soleiðis er eisini her, onki ber til, tí dømini altíð eru tær smæstu kommununar.

Hetta gongur ímóti kommunuálitinum og ætlanum landstýrisins um at styrkja kommununar við at lata teimum fleiri uppgávur. Vit kunnu ímynda okkum raðfestingina av útjaðaraøkinum, tá Almannastovan her norði t.d ikki hevur ein deildarleiðara á staðnum. Samstundis hevur kommunan sjálv raðfest hetta økið høgt við millum annað at endurstovna sosialu deild, júst fyri at brynja okkum út til at yvirtaka almannaøkið.

Spurningurin er stutt og greitt, hvar barnaverndarøkið best verður umsitið til frama fyri barnið, familjuna og borgaran sum heild. Her er svarið, at tær flestu av verandi kommunum eru ov smáar til tess, men við størri kommunalum eindum fáa vit neyðugu støddina til at uppbyggja neyðuga fakkunnleikan. Tað fáa vit ikki um alt verður umsitið frá eini høvuðsskrivstova í Tórshavn, samstundis sum nær fólkaræðið verður mist burtur tí umsitingin liggur alt ov langt vekk frá borgarunum og ikki hevur innlit og kunnleika í tey ymsu økini.

At fara frá teimum smáu barnaverndunum vit hava í dag og til eina yvirskipaða eind er eitt langt lop, lat okkum heldur halda okkum til 7 ella 9 økir ið kunnu samstarva. Her kundu Norðoyggjar verið ein sjálvstøðug eind, har sosialráðgevarar og sálarfrøðingar, umframt at arbeiða við barnaverndarmálum, eisini vera tøk til annað arbeiði fyri sosialu deild til frama fyri alt fólkið í nærumhvørvinum.

Okkara støða er heilt greið, grundstøði má vera tað sama sum í kommunuálitinum, at landið er kærumyndugleiki, meðan kommununar einsamallar umsita tey málsøki, tær yvirtaka. Verður uppskotið frá almanna- og heilsumálastýrinum samtykt, er lítið høpi í tosinum um at leggja út til kommununar og enn minni at tosa um greitt uppgávu- og ábyrgdarbýtið.

# ítróttur

Nr. 4 • leygardagur • 6. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo




*Í Vági eru tey fegin um, at Christina Holm nú aftur er á liðnum hjá barndómsfelagnum*

*Mynd: Edvard Joensen*

Sóljan-VB 11-29 (3-15)

# Tryggur VB-sigur

**VB kvinnurnar vóru ivaleysar, tá tær vóru vesturi í Vágunum, har Sóljan nú skal læra at standa seg uttan Simonu Dziugyte. Hjá VB var Christina Holm aftur at síggja á liðnum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ofta verður tikið til, at tølini tala fyri seg, og ósamdur í hesum kann mann neyvan vera, tá talan er um dystin millum Sóljuna og VB hóskvøldið.

12 mál vóru á muni í hálvleikinum, og sum dømi um VB-dominansin kann eisini nevnast, at tá 22 minuttir vóru leiktir av dystinum, var støðan heili 12-1 til VB.

Úr Vágunum frættist, at trygga VB leiðslan ikki minst varð grundað á stórspæl frá málverjanum, Guðrun á Lágabø, og einum framfýsnum verjuspælið, har serliga Gurið Mortensen gjørdi sítt til at órógva vágagenturnar. Hesar hava enn ikki neyðugu royndirnar, og tískil kom ofta fjáltur á tær, soleiðis at bóltførleikin ikki var, sum hann helst skal vera.

Frægasti leikarin hjá Sóljuni mundi annars vera Kristina Griksaite í málinum, men hóast stórtapið, so vóru eisini einstakir glottar at síggja, skilst.

## Eingin Simona

Hóast tað neyvan er móti VB, at Sóljan skal gera sær vónir um stig, so sýndi dysturin tó, at tær har vesturi nú skulu læra at standa seg uttan litaviska stórskjúttan, sum annars hevur verið teimum ein hollur stuðul higartil í árinum.

Hetta fer tó ivaleyst eisini at viðføra, at aðrar noyðast at taka ábyrgd, og vilja og kunna tær tað, so fer tað kanska ikki at verða so heilt galið við hondbóltsliðnum hjá Sóljuni. Málið hava tær langt síðani sett sær, nevnliga at yvirliva í deildini, og heilt veruleikafjart er hetta heldur ikki. Verður heimadysturin móti Tjaldri vunnin, er komið meira enn hálva leið í hesum, so helst er tað hetta, sum sóljurnar fyrst og fremst skulu hugsa um. Móti VB og teirra líkum verður tað neyvan, at stigini fara at koma.

## Christina við aftur

Millum tær, sum hesa ferð vóru á VB liðnum, var landsliðsleikarin, Christina Holm. Hon er júst um at koma fyri seg eftir knæskaða, og nú hon kortini hevur bundið frið í ein mánað, hevur hon skift tilveruna í Kyndli út við ta í VB.

Einki er at ivast í, at hetta er kærkomið hjá VB, og hetta ásannaði venjarin, Egill Steintórsson eisin eftir dystin.

– Júst strikuspælið hevur verið okkum ein trupulleiki, tí vit hava verið noydd at royna fólk, sum eru óvandar á plássinum. Nú Christina er við aftur, er hesin trupulleiki burturi, og ikki minst í verjupartinum styrkir hetta um hjá okkum.

Annars eru VB genturnar rættiliga ónøgdar um, hvussu tær hesa vikuna hava verið noyddar at ferðast norður um fjørðin. Mikukvøldið spældu tær í Runavík, hóskvøldið á Giljanesi og sunnudagin skulu tær til Havnar at royna seg móti Neistanum. Í Vági høvdu tey annars roynt at flyta dystin móti Tjaldrinum til leygardag, soleiðis at tær kundu fara norður fríggjadag, og so spæla tríggjar dagar á rað, men hetta vildu tær í Runavík ikki, verður sagt.

– Eg kann bara ikki annað enn vera stoltur av, at genturnar møttu upp hvør sum ein. Vit hava ikki í hyggju at geva upp orsakað av slíkum forðingum, men eg haldi tó, at tað átti at borið til, at lagt hetta betri til rættis, segði Egill Steintórsson at enda. Nøgdur hóast alt, nú VB fekk tvey stig og sess í hálvfinaluni í Coca-Cola kappingini burtur úr ferðingini.

## Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Sóljan: Marjun Jørgensen 4(2), Sólja Nielsen 2, Jóna Gudmundsen 1, Hertha Simonsen 1, Heidi Haraldsen 1, Fía Selma Nielsen 1, Heidi M. Akselsen
VB: Gurið Mortensen 8, Andrea Lütz 6, Regina Radó 5(2), Sólrun Krosslá 4, Christina Holm 2, Rannvá Augustinussen 1, Guðrun Augustinussen 1, Laila Jespersen 1, Mary Krosslá 1
Brotskøst: Sóljan 4, VB 2
Útvísingar: Sóljan 2, VB 1
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

# John Arni ger um seg í Danmark

**Føroya fremsti telvari, skopuningurin John Arni Nilssen, telvaði um árslok við í sterkari kapping í Keypmannahavn. Hann endaði sum nummar tvey aftanfyri stórmeistaran og amerikumannin Nick De Firmian.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Í Danmark eru ígjøgnum alt árið nógvar kappingar at fara til, eisini ímillum jól og nýttár. Í Øbro sum er ein býarpartur í Keypmannahavn, vóru menn sum GM Nick De Firmian (2567), IM Erling Mortensen (2438) og IM Ole Jacobsen (2403) møttir í døgunum 27-30. desember.

Tveyogtredivu luttakarar og millum hesar varð John Arni styrkismettur sum nummar fýra. Sjey talv skuldu telvast. Tað vísti seg beinanvegen at De Firmian fór at enda ovastur, men kappingin um annað plássið varð hinvegin hørð og jøvn.

Endaliga støðan í toppinum bleiv hendan:

| | |
|---|---|
| GM Nick De Firmian | 6,5 av 7 |
| John Arni Nilssen | 5 |
| IM Ole Jacobsen | 5 |
| Esben Lund | 5 |
| Claus Rossen | 5 |
| IM Erling Mortensen | 4,5 |

Eitt gott úrslit hjá John Arna. Hann tapti bert tað eina talvið, ímóti De Firmian í triðja umfari. Tveir javnleikir ímóti Ole Jacobsen og Esben Lund og fýra vunnin talv vórðu hini úrslitini. Fitt av ratingi ognaði John Arni sær, umleið eini 10-15 stig.

John Arni sigur seg vera nøgdan við sjálva úrtøkuna, men sigur tó at spæl hansara kundi verið betur, og júst í talvinum ímóti De Firmian meinti hann seg hava góða støðu og átti tískil ikki at hava tapt.

John Arni nærkast nú spakuliga 2400 í rating, men enn skulu nakrar góðar kappingar gjøgnumførast. Næsta kapping hjá honum byrjaði í gjár í Gausdal, Norra, har hann fer at stríðast í døgunum 5 — 12. januar í einari sera sterkari opnari kapping. Eitt nú hevur Kramnik telva í júst somu kapping fyrst í nítiárinum.

## HT-KTF

Fjórða umfar í liðkappingini verður í dag, og serliga tveir dystir í fyrstu deild eru áhugaverdir og spennandi. Tað er klassiska uppgerðin millum Havnar Telvingarfelag og Klaksvíkar Talvfelag. Bæði liðini hava seks stig, men liggja tó beint í hølinum av liðunum úr Hvalvík og Kollafirði, sum eisini hittast í dag til toppbrak. Liðini bæði hava sjey stig. Hin dysturin er millum vestmenningar og sandavágsmenn.

Nógvir útisetar eru heima, og helst vera onkrir av hesum við á barndómsfeløgunum sínum við vón um at hjálpa teimum.